
# Fossbankasteypakappingin

*Marner og teir vunnu fossbankasteypin aftur í ár.*



**Steypavinnararnir og komandi føroyameistararnir kappast við borðið. Frá vinstru: Jóanes Mouritsen, Marner Joensen, Per Kallsberg og Hans Egil Joensen**

Finalurnar vórðu spældar leygardagin. Liðini í semifinaluni vóru
Marner Joensen (Marner, Hans Egil Joensen, Arni Dam og Marni Gaard, ið spældi fyri Edmund Joensen)
Helgi Joensen (Helgi, Dánjal P. Mohr, Per Kallsberg og Jóanes Mouritsen)
Carl Mikkelsen, (Carl, Petur S. Rasmussen, Høgni Jacobsen og Arnbjørn Sivertsen, ið spældi fyri Mortan Rasmussen)
Trygvi Vestergaard, (Trygvi, Egil Helmsdal, Reimar Isaksen og Børge Egholm).

Í semifinaluni skuldi Marner spæla móti Helga og Carl móti Trygva.

Allir hesir 16 eru millum avgjørt bestu spælararnar í Føroyum, og sást hetta av úrslitunum av dystunum, ikki var munurin stórur. Liðið hjá Marner vann sin dyst 17-13, Carl sín 16-14. Síðani varð farið undir finaluna, í hálvleikinum aftaná 16 spøl førdi liðið hjá Carl við 2 imp. Av tí at so stórur spenningur var, varð avgjørt at nú skuldi eisini gerast upp tá 24 spøl vóru spæld, og tá hevði Carl vunnið 3 imp afturat, men so kom vend í, aftan á 28 spøl var Marner farin 6 imp framum, og tá øll 32 spølini vóru spæld, førdi Marner við 5 imp og vann fossbankasteypin við 16-14.

Steypavinnararnir fara at luttaka í norðurlendsku kappingini fyri steypavinnarar í Rottnerros í Svøriki, seinni í vár.

Tit fáa eitt spæl frá semifinaluni, har liðini hjá Marner og Carl vunnu nøkur imp.

## Opin kapping

Tær regluligu vetrarkappingarnar í feløgunum eru nú um at vera loknar í ár, og so verður onki bridgespæl aftur fyrr enn í heyste, men ofta hevur verið borið upp á mál, um at halda opnar kappingar um summarið, so ikki øll venjingin fer í gloymskna, meðan vit halda ammarfrí.

Bridgefeløgini í Havn ætla at hava nakrar opnar kappingar í summar og bjóðaðu teir til ta fyrstu sunnudagin 17/3, sjálvt um skotbráið var heldur stutt, teir lýstu ikki kappingina fyrrenn friggjadagin, var undirtøkan rættuliga góð, 36 spælarar, og stuttligt var at siggja fólk úr feløgunum á bygd møta til hesa kapping.

Spælt varð í tveimum røðum.

Rað A, 5 borð, meðan 144

| | |
|---|---|
| Kjartan Johansen-Sjúrður Magnussen | 174 stig |
| Súsanna Dam-Jórun Johannesen | 162 stig |
| Ingi Helmsdal-Arnbj. Sivertsen | 159 stig |

Rað B, 4 borð, meðal 105

| | |
|---|---|
| Jóannes Mouritsen-Birgir Mortensen | 118 stig |
| Sigmund Dam-Páll Hansen | 117 stig |
| Heðin Mouritsen-Rói Joensen | 112 stig |

E/E-V

| | | |
|---|---|---|
| | N:<br>♠ K Q 9<br>♡ J 2<br>◇ E K Q J 5 6<br>♣ 8 5 | |
| V:<br>♠ J 6<br>♡ K 8 5 4 3<br>◇ 8 7<br>♣ Q 7 6 4 | N<br>V E<br>S | E:<br>♠<br>♡ E 7 4<br>◇ Q 10 6<br>♣ 10 9<br>K J 9 3 2 |
| | S:<br>♠ 10 8 5 3 2<br>♡ E 9 7<br>◇ 4 3 2<br>♣ E 10 | |

Við tvey borð skuldi Suður spæla 3 UT. Arnbjørn Sivertsen spældi 3 ut við eina borðið og hann var — sum altíð — púra cool. Hann fekk hj 4 út til J. Q. og smátt. Eystur spælir hj 10 aftur, sum hann sleppur at eiga, tí Arnbjørn fellur aftur frá við einum hugnaligum smili. Nú hevði verið rætt um eystur skifti til kleyvara, men hann spælir triðja hjartað. Suður tekur við essinum og spælir hj K. Eystur kemu rupp á hj E, men nú er ov seint við kleyvaranum. Arnbjørn tekur síni nýggju stikk, seks í rútara, og eitt í hvørjum av hinum litunum.

Jóannes Mouritsen spældi eisini 3 ut og fekk sama útspæl, men hann roknaði øðrvísi. Jóannes stakk hjartaran aðru ferð, tí hann ræddist skift til kleyvara. Eystur kom seinni inn upp á hj E og átti ein hjartara at spæla aftur til K 8 hjá vestri. Situr hjartarin 6-2 við tveimum í eystri, er sjálvandi rætt at stinga aðru ferð, soleiðis sum kortbýtið er, men tað var tað ikki hesuferð.

3 ut og eitt stikk ov lítið.

Steyp vóru til vinnararnar.

Eitt óføra gott tiltak, bridgefeløgini í Havn eru farin undir, og vit bíða nú eftir, at teir og vónandi onnur feløg eisini fara at skipa aðrar opnar kappingar í summar. Um fólk bert fáa eitt rimiligt skotbrá, er onki at ivast í at væl verður tikið undir.

## FM kappingarnar

Kappingin um FM-heitið fyri pør verður spæld á Argjum hin 13. og 14. apríl. Kappast verður eftir somu reglum sum árini fyri, í semifinaluni luttaka 54 pør, býtt millum feløgini í mun til limatalið. Spælt verður í trimum røðum, og 6 tey bestu úr hvørjum raði fara til finaluna.

Seinastu umførini í liðkappingini verða eisini spæld á Argjum 19. og 20. apríl.

# Haldið okkum uttanfyri

Í Oyggjatíðindum setir ítróttarskrivarin Finnur Helmsdal Føroya Blaðmannafelag nakrar beinleiðis spurningar um pressuetikk.

Hetta verður gjørt í sambandi við kegl, sum seinastu dagarnar hevur verið millum Sosialin og Oyggjatíðindi um manningina á Oyggjatíðindum.

Finnur Helmsdal er so frægur maður, at hann ikki setir undirritaðu í samband við skrivingina um málið í Sosialinum, har eg arbeiði.

Finnur eftirlýsir, hvørja støðu Føroya Blaðmannafelag hevur. Hann er sjálvur limur í felagnum.

Fyri tað fyrsta kann eg upplýsa, at felagið ongantíð hevur lagt seg út í stríð millum limir. Ei heldur millum fjølmiðlar. Har má hvør svara fyri seg.

Men tá hann spyr **meg** beinleiðis um etiska virðið í útspillingini, svari eg fyri meg sjálva:

Einki hampa blaðfólk við virðing fyri fakinum finnur uppá at fara niður í slíkt runudíki við ófantaligum ákærum og útspillingum, um tað so er í Sosialinum ella á Oyggjatíðindum.

Hetta er vónandi nóg greitt svar.

*Við vón um etiskari skriving í framtíðini*

**Randi Jacobsen**
**forkvinna í Føroya Blaðmannafelag**


386 Teldur
16 – 33 Mhz
Desktop Publishing
ConCorde
Albatros
DSI-SYSTEM
WordPerfect
Windows



MICROFORM
Dr. Jakobsensgøta 17-19 * tlf. 17211 * fax 10415
Postrúm 198 * FR-110 Tórshavn
MIÐ STARFSLAGIÐ